# Vónríkir skiparar: Útlitini eru

**Brandur Nólsoy og Lion Petersen hava báðir góðar vónir um, at raksturin hjá Atlantic Navigator verður betur, enn hann var við gamla skipinum. - Næraberg hevur fiskað fyri góðar 100 miljónir krónur í góðar níggju mánaðir í ár, og prísurin hevur verið vánaligur. Møguleikarnir við Atlantic Navigator eru munandi størri, enn teir við Nærabergi, siga teir**

ATLANTIC NAVIGATOR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Skiparar umborð á størsta fiskifarinum í føroyska fiskiskipaflotanum, Atlantic Navigator, verða Brandur Nólsoy og Lion Petersen, annar úr Havn og hin úr Klaksvík.

Brandur hevur siglt við Nærabergi í skjótt fimm ár; tey fyrstu árini var hann stýrimaður, og síðan á sumri í 2003 hevur hann verið fastur skipari.

Áðrenn hann kom umborð á Næraberg, sigldi Brandur við norskum trolarum, og í 1999 var hann eitt skifti skipari umborð á Pelagos.

Hann hevur eisini verið við øðrum skipum undir Føroyum. Brandur hevur drúgvar royndir á troldekki og á trolarabrúgv.

Hin skiparin umborð á Nærabergi er klaksvíkingurin, Lion Petersen, sum eisini hevur drúgvar royndir á sjónum.

Áðrenn Lion kom umborð sum skipari, skiftust Brandur og Mannbjørn í Grund at føra Næraberg.

Nú skulu so Brandur og Lion skiftast um at føra hetta risa fiskifar.

Atlantic Navigator loysti í Ánunum seinnapartin mánadagin. Hendan fyrsta túrin, har tey fara at royna útgerðina, eru báðir skiparnir umborð, men síðan fer Lion í land, og Brandur fer avstað aftur.

Hesin túrurin verður undir øllum umstøðum stuttur, tí fólk eru umborð, sum skulu í land aftur fyri jól.

## Vitjan

Sosialurin var umborð á Atlantic Navigator á vitjan fyrrapartin mánadagin.

Hóast almenna móttøkan fyri skipinum var sunnudagin, vóru vit vælkomnir umborð at síggja skipið og práta við fólk.

Kranin hivaði ymiska útgerð umborð, tá ið vit komu oman á bryggjuna, og fólk stákaðust umborð og uppi á bryggjuni við at rigga skipið til.

Nógv ting eru, sum skulu fáast upp á pláss, tá ið eitt so stórt skip við so stórari manning fer fyrsta túrin.

Á brúnni hittu vit skiparan, Brand Nólsoy, sum er sonur kendu andlitini í Havnini, Napoleon og Gnippu Nólsoy.

Meðan vit práta, kemur hin skiparin, Lion Petersen, eisini upp á brúnna.

Báðir eru teir fryntligir og geva sær stundir at práta.

Lion kom umborð á Næraberg sum skipari í 2003, og tað var eisini hann, sum stóð á brúnni á Nærabergi, nú teir vóru seinasta túrin í heyst.

Næraberg fór yvir til Noregs, tá ið Atlantic Navigator varð riggaður til at loysa hann av, og ein partur av útbúnaðinum á nýggja skipinum er komin av Nærabergi.

Umframt skerimaskinurnar, er eisini onkur útbúnaður, sum Næraberg hevði á brúnni, settur umborð á Atlantic Navigator.





## 7 tjóðir

Brandur sigur, at stórur áhugi hevur verið at sleppa umborð á nýggja trolaran, og nú teir loystu, vóru tilsamans 100 fólk umborð, harav einar 20 kvinnur.

Men tað eru ikki bara føroyingar, sum eru við Atlantic Navigator.

- Vit eru sjey tjóðir umborð, og umframt føroyingar, eru fólk úr Noregi, Danmark, Póllandi, Ruslandi, Japan og Ameriku eisini við.

Brandur sigur, at manningin at kalla er hin sama sum var við Nærabergi og áður hevur verið við hesum skipi.

*- Nú kunnu vit fáa meira burtur úr upp á lutfalsliga stutta tíð, tá ið góður fiskiskapur er, og fiskurin er góður. Hetta gevur skipinum betri møguleikar, siga skipararnir, Brandur Nólsoy og Lion Petersen*

*Mynd: Jens Kr. Vang*